# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá ið kæra mamma, omma, vermamma og systir okkara

**Tóra Bærentsen**
á Sundi

andaðist og varð jarðað.

*Kærar heilsanir*
**Benadikta, Sigrid, Jákup, Hanus, Marianna, Turið, Pauli og Sælbjørg**

## Tøkk

Hjartaliga tøkk øll tit, ið á ymiskan hátt gleddu meg á 85 ára føðingardegnum 29. juli.

**Heilsan**
**Hildegerd Højgaard, Rituvík**

Sosialurin -har tað hendir

# Millumskúlaflokkur



*Myndaeigari: Svanhild Joensen*

Mynd frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Myndin er av triðja millumskúlaflokki skúlaárið 1961-62.

**Aftasta rað f.v.:** Jógvan við Ánna, lærari; Durita Davidsen, Jóna Christiansen (Frederiksen), Katrin Hansen (Johansen) og Lív Dam.

**Miðraðið f.v.:** Dánjal Hofgaard, Claus Bonnebie, Karin Djurhuus, Jóna Guttesen (Rasmussen), Bergljót Ihlen, Svanhild Christiansen (Joensen), Eyðbjørg Andrésen, Tordis Helmsdal og Erla Højgaard.

**Fremst f.v.:** Birgir Árting, Hartmann Joensen og Jógvan Arge.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024 (mynd nr. 22).

# Norðbil selt fyrsta hybridbilin

**Í gjár seldi Norðbil sín fyrsta hybridbil. Talan var um ein Honda Civic Hybrid, sum Kári Mortensen í Havn keypti**

Honda Civic Hybrid hevur bæði bensin- og elmotor við tilsamans 93 hk, harav teir 20 hk koma frá elmotorinum. Bilurin er royndarkoyrdur í Føroyum og koyrir umleið 25 km/l við vanligari koyring eftir landsvegi. CO2-útlátið er 109 gr/km. Honda hava gjørt hybridbilar síðan 1999, tá fyrsti Honda Insight kom á marknaðin.




*Birgir Dam Jacobsen frá Norðbil (h.m.) handar Kára Mortensen lyklarnar til Honda hybridbilin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*